# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

12. apríl fingu Lydia og Eyðun Rasmussen, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3800 gr.

13. apríl fingu Annbritt Ellingsgaard og Hallur Petersen, Sørvági, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3900 gr.

14. apríl fingu Anna og Søren Bertholdsen, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4250 gr.

15. apríl fingu Fríðgerð og Árni Rasmussen, Argjum, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3750 gr.

15. apríl fingu Sylvia Poulsen, Vági, og Jóan Pauli Thomsen, Hvalba, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3600 gr.

15. apríl fingu Elaina og Eljón Poulsen, Kaldbak, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3700 gr.

18. apríl fingu Heidi Petersen og Hans Jacob Kollsker, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3900 gr.

19. apríl fingu Vanja Dam og Ragnar Joensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3350 gr.

## Andlát

14. apríl
Katrina Gregersen, fødd Thomsen, Syrðugøta, 78 ár.

15. apríl
Svanhild Mohr Joensen, Tórshavn, 83 ár.

16. apríl
Hans Erik Andersen, Korsør, maður Sólrun Jensen á Sandi, 61 ár.

17. apríl
Niels Mouritsen, úr Sørvági, 82 ár.
Mia á Høgaryggi, Nólsoy, 97 ár.

18. apríl
Jógvan Joensen, Skúvoy, vanliga nevndur Jógvan á Fløtti, 90 ár.

# 48 tímar í brunnin fyri at gifta seg

18 ára gamli indarin var sinnaður at ganga sera langt fyri at fáa foreldrini at skilja, at hann vildi gifta seg.

Allir vinirnir hjá Rajesh (18) vóru langt síðani giftir, men foreldrini hjá tí 18 ára gamla úr býnum Latki vóru ikki enn farin at hugsa um slíkt.

Fyri at vísa teimum, at hann veruliga ynskti at giftast, avgjørdi Rajesh at leypa niður í brunnin hjá familjuni. Hann hótti við at drukna seg, um foreldrini ikki byrjaðu at leita eftir eini brúður til hansara.

Tíbetur kom ein familja úr grannabýnum teimum til hjálpar. Tey vildu gjarna gifta burtur dóttur sína, og foreldrini hjá dreinginum samtyktu uppá staðið.

Eftir at hava verið í brunninum í samfullar 48 tímar kom Rajesh uppaftur, og er hann nú, sambært United News of India, giftur.

## Minningarorð um abba okkara

# Magnus Magnussen

**f. 15/5-1928 d. 23/2-2005**



Góði abbi, mikudagurin 23/2-2005 fer altíð at standa fast grógvin í minni okkara sum ein sorgardagur. Leingi var tú sjúkur, og vit vistu øll, at tú hevði tað ikki altíð gott, men tú megnaði altíð at menna teg aftur. Tað vardi tí ikki nakran av okkum, at tú skuldi verða tikin heim til Jesus pápan so skjótt.

Saknurin eftir teg er ómetaliga stórur, tí vit høvdu so nógv saman.

Tað sum eyðkendi teg var, at tú hugsaði altíð um okkum fimm abbabørn. Hvørja ferð vit skuldu av oynni, stóðu tár í eygum tínum. Vit fingu at vita, at vit máttu ansa væl eftir okkum og koma skjótt aftur til Húsavíkar.

Vit hava fingið nógv góð minnir frá tær, sum vit altíð fara at goyma væl í hjørtum okkara, sum eitt tað dýrasta vit eiga. Tað er nógv vit kunnu nevna, ið vit hava eftir teg. Eitt tað týdningarmesta fyri okkum var, at tú altíð tímdi at hava okkum við. Vit merktu ongantíð, at tú var troyttur av okkum. Altíð í góðum hýri og dámdi væl at skemtast.

Onki var sum at taka í tína sterku og tryggu hond. Onki var sum at sita undir tínari lið ella í fanginum á tær og lurta eftir søgum.

Mangir vóru túrarnir til Dals við tær, tá tú koyrdi post. Tú tók tær altíð tíð at hava okkum við, og um tað ikki lá fyri, fingu vit altíð at vita, at vit skuldu sleppa dagin eftir. Tá tú gavst at koyra post vegna aldur og mamma tók yvir eftir teg, tók tú uppá teg at koma norð til okkum og fáa okkum í skúla, tá pápin ikki var heima.

At tú var sera tolin við okkum, er onki at ivast í. Klokkan sjey kom tú inn at vekja okkum og seðgi at tú fór at gera klárt til morgunmat. Síðani blivu klæðini hongd á ovnin, tey skuldu verða heit, tá vit komu upp. Tú kundi ganga fleiri ferðir inn á kamarið og biðja okkum royna at koma upp. Ongatíð var tú ilskur ella segði eitt øvugt orð. Altíð hevði tú eitt smíl um varrarnar, tá vit øll sótu um borðið og ótu, klár til dagsins gerningar.

Abbi, fyri okkum tríggjar systrar í Húsavík, hevur tú ikki einans verið ein góður abbi, men til tíðir eisini ein pápi, tá pápin var úti og sigldi. Mammusa høgra hond var tú eisini, altíð klárur at hjálpa, hvat tað so var, vit bóðu um.

Hjálpsemi og góðska til tíni nærmastu var nakað, ið semerkti teg. Líkamikið hvør hevði brúk fyri eini hjálpandi hond, var tú klárur. Tað skalt tú hava takk fyri.

Tú átti eisini tvey abbabørn í Havn. Tey hava, sum vit, eisini kent tín stóra kærleika. Frøin var stór, tá tey skuldu koma suður á vitjan. Mangar vóru løturnar, sum tú og Búgvi høvdu í kjallarinum millum allar bátarnar. Búgvi dugdi væl at greiða frá, hvussu teir skuldu síggja út, og hvussu teir skuldu eita. Síðani royndu tit báðir, eftir førimuni, at fáa teir so vakrar sum møguligt. Tit sótu ofta leingi og smíðaðu og riggaðu til. Dagin eftir var túnið fult av bátum, kei bleiv bygd við klemmunum hjá Ommu, og tú stóð uppi yvir honum og fróddist um verkið.

Tú og Iris fingu ikki nógv ár saman, men tey fáu árini vóru nøkur góð ár, sum vit skulu vera takksom fyri.

Tað var sera týdningarmikið fyri teg, at vit hildu væl saman, vóru góð við hvønn annan, og eina mest, onki klandur mátti skilja okkum.

Alt sum hevði tín stóra áhuga, Abbi, var at finna her í Húsavík. Heimaseyðurin, Innarahagi og gásin, gekk tú uppí við lív og sál. Alt bleiv røktað líka væl. Tá tú var væl fyri og orkaði, gekk tú dagliga inn í hagan og taldi allan seyðin, fyri at tryggja tær at allir vóru til. Abbi, tað vóru ikki bara vit sum vóru góð við teg. Tað sást á tí stóra skara sum fylgdi tær til tín síðsta hvíldarstað. Mong eru eisini tey, ið hava hjálpt okkum í hesi sváru tíð. Øll hesi fólkini vóru eisini góð við teg og fara eins og vit at kenna stóran sakn eftir teg.

Tú og Omma vóru bert 16 ára gomul, tá tit funnu hvønn annan, og hava hildið saman líka síðan tá. At tit hava havt tað gott saman, kann ongin seta spurnartekin við. Tykkara kærleiki til hvønn annan, fer altið at fylgja og hjálpa okkum. Vónandi kunnu vit ein dag finna slíkan kærleika og geva hann víðari til onnur.

Abbi, vit hava alt at takka tær fyri. Tú hevur givið okkum so nógv, ið vit kunnu nýta gott av víðari á lívsleið okkara. Vit fara altíð at kenna saknin eftir teg í hjørtum okkara.

Abbi, tú var móður nú. Tú hevði nátt tað tú skuldi. Bylgjan hevur mangan verið brøtt, men tú náddi í havn, og hevur nú lagt árarnar inn. Tá vit hava gingið lívsleið okkara, møtast vit aftur í himli.

Abbi, tú skal hava takk fyri óteljandi góðar løtur og óteljandi góð minnir.

Takk fyri tín kærleika.

Við hesum fáu orðum lýsa vit frið yvir minnið um okkara høgt elskaða Abba, Magnus Magnussen.

"Deyðin er ikki tað seinasta, eg eri bert farin um sýnuna. Eg eri eg og tú ert tú. Tað, sum vit áður vóru fyri hvør øðrum, tað eru vit enn. Nevn meg við navni, nýt mítt yndisnavn, práta við meg um leyst og fast, sum vit altíð gjørdu. Lat røddina vera hina somu, hóast sorg og sakn. Flenn soleiðis, sum vit vóru von at flenna saman at onkrum skemtiligum. Hugna tær, brosa, hugsa um meg, bið fyri mær. Lat mítt navn framvegis hoyra upp í okkara húski. Tala um meg natúrliga, ikki við gráturødd. Lívið er framvegis dýrabart, tað er eins og tað altíð var, tað heldur á øld eftir øld. Deyði og lív hoyra saman. Hví skuldi eg fari úr huga, um eg fór úr eygsjón? Eg bíði bara eftir tær, um eina stund, onkustaðni her í nánd, aftan fyri sýnuna".

Hvíl í friði.

**Abbabørnini**